# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Silvurbrúdleyp



Mánadagin 12. mai 2003 hava Lív og Dánial á Dul Jacobsen silvurbrúdleyp. Tey eru bæði uppvaksin í miðbýnum í Havn.

Lív er dóttir Annu Sofíu og Andreas Jacobsen (í Køkubúðini), og Dánial er sonur Katrin á Dul og Arna Jacobsen. Av foreldrunum hjá teimum, verður tað bert Annufía, sum kemur at upplíva henda dag.

Lív og Dánial eiga børnini Arna og Ann Gvøðny. Ann Gvøðny er gift við Johannes Ólavsson, sum er úr Vestmanna.

Í heiminum hjá Lív og Dánial búgva eisini tríggjar fittar systrar. Tær eita Iris 8 ár, Sarah 6 ár og Anja 5 ár.

Lív er útbúgvin sum tannklinikassistentur, men hevur tey seinastu árini arbeitt sum dagrøktari, og Dánial arbeiðir á Føroya Sjómannsskúla.

Tey eru sera virkin í andaligum arbeiði, og eru fyristøðufólk í hvítusunnusamkomuni í Evangeliihúsinum í Havn.

Silvurbrúdleypsdagin 12. mai, verður opið hús í Heygskróki.

Dýrabiðidag 16. mai, verður silvurbrúdleypsveitsla og vælsignilsi.

Henda dagin ætla tey at halda soleiðis:
kl. 15.00 vælsignilsi í Evangeliihúsinum
- 16.30 veitsla fyri innbodnum børnum á Hotel Hafnia
- 19.00 veitsla hjá innbodnum á Hotel Føroyum

Vit ynskja teimum hjartaliga tillukku og Harrans signing silvurbrúdleypsdagin og framyvir.

**Systkini**

## Rasmus Nygaard seinasta starvsdag



1. mai fór Rasmus Nygaard í Havn frá sum vindeygavaskari. Rasmus er 67 ára gamal. Hann er føddur á Fyn, tætt við Odense, men hevur búð í Føroyum síðan 1959. Fyrsta árið arbeiddi hann hjá byggimeistaranun Petur Michelsen í Havn. Síðan arbeiddi hann á minkagarðinum í Hoydølum, har sum Skógrøkt Landsins er í dag. Har arbeiddi hann til 1971. Síðan tá hevur Rasmus arbeitt sum vindeygavaskari. Umframt at vaska vindeygu hjá privatfólki, hevur hann eisini vaska fyri stovnar, sum t.d. Føroya Banka og Føroya Tele, sum hann hevur arbeitt hjá síðan 1980. Í sambandi við at Rasmus var givin sum vindeygavaskari, var ein lítil móttøka á Føroya Tele mikudagin 7. mai, har hann eisini fekk onkra gávu. Men Rasmus er ikki arbeiðsleysur, hann ger sjálvur prýðislutir og umvælir prýðislutir fyri fólk. Hann er giftur við Aase, f. Andersen, úr Randers og tey eiga sonin Otniel, sum býr á Tvøroyri. Aase og Rasmus eru bæði Jehova Vitni.

# Ansa Djurhuus

## 13. juni 1913 – 30. apríl 2003



30. apríl andaðist Ansa Djurhuus, fyrrverandi fyristøðukvinna á hvíldarheiminum Naina, 89 ára gomul. Ansa var fødd á Stykkinum 13. juni 1913. Tey vóru átta systkin í barnaflokkinum hjá Elisabeth og Ludvig Christiansen, fimm brøður og tríggjar systrar.

Ansa giftist við Johan Djurhuus úr Porkeri. Tá hann doyði í 1992, seldi Ansa húsini í Varðabú í Havn, og flutti í varda íbúð uppi við Lágargarð; tá hon ikki var før fyri at halda hús longur, kom hon á Lágargarð.

Í 1933 fór Ansa í læru sum sjúkrasystir á Dronning Alexandrines Hospital. Í 1936 fór hon niður, og starvaðist sum sjúkrasystir í Keypmannahavn.

Heim aftur komin eftir kríggið búsettust tey í Havn. Tá Christian Holm Jacobsen, útgerðarmaður, í 1947 bygdi nýggjan trolara í Onglandi, hevði Johan eftirlit við bygginginini, og varð síðan maskinmeistari við trolaranum "Nólsoyar Páll". Í 1958 varð Johan settur í starv sum eftirlitsmaður á Statens Skibstilsyn.

Ansa tók við sum fyristøðukvinna á hvíldarheiminum NAINA í 1965 og var í hesum starvi, til hon legði frá sær fyri aldur í 1983. Ansa hevði góð evni sum fyriskipari, og tey árini hon var fyristøðukvinna, varð hvíldarheimið munandi víðkað og nútímansgjørt.

**jl**

### Minningarorð um beiggja mín

# Bjarta Mortensen

**føddur 18.08.1962 deyður 23.03.2003**

Tá telefonin ringdi tíðliga sunnudagin 23. mars, visti eg beinanvegin hví. Tað var pabba, ið segði at Bjarti var farin. Eg hevði sitið leygardagin seinnapartin og um kvøldið hjá honum. Hann svav fyri tað mesta, og eg sá tá, at hann hevði stutt eftir.

Bjarti var føddur og vaks upp á Tvøroyri. Undir Heygnum, fjálgaður av mammu, meðan pabba var á sjónum mest sum alt árið. Hetta var okkara lítla verð og vit høvdu tað gott saman. Tað vóru 5 ár ímillum okkum báðar, so vit høvdu hvør sín gerandisdag uttan fyri heimið, men í heiminum vóru vit beiggjar og stóðu lið um lið.

Meðan eg fór til Havnar og síðani til Keypmannahavnar í lestrarørindum, varð Bjarti eftir á Tvøroyri. Hann vildi heldur vera har og arbeiða har. Hann fekk fast arbeiði hjá R. B. Thomsen, og treivst hann væl í hesum arbeiði. Hann elskaði heimbygdina. TB var hansara hjartabarn og knýtti hann nógv vinabond hendan vegin. Eitt annað áhugamál var jørðin og seyðurin á Hamri í Froðba, har mamma er ættað. Hetta var hansara: Eitt gott arbeiðspláss og so ítrivini á Tvøroyri.

Tá hann so møtti Sonny, var hann sera eydnusamur. Alt sá gott út. Men sum snarljós frá klárum himli fekk hann sjáldsama sjúku. Hetta setti sín dám á hansara gerandisdag. Hann mátti fara úr arbeiði sínum og frítíðarítrivið, seyðin, fekk hann ikki verið við í. Men ongantíð misti hann mótið ella lívsviljan. Hóast inn og út av sjúkrahúsi bæði í Føroyum og Danmark, var hann altíð positivur og glaður. Hann hevði alla tíðina vónina um at gerast frískur aftur.

Tað seinasta árið bíðaði hann so eftir einum lunga. Í hesum tíðarskeiði vóru eg og Bára og vitjaðu hann í Keypmannahavn, meðan Sonny var heima. Hetta var ein sera góð tíð, har eg lærdi Bjarti at kenna á ein øðrvísi hátt. At vera saman við Bjarti hetta tíðarskeiðið hevur fingið ein at steðga á og venda eyguni móti øðrum her í lívinum enn bert henda jagstran eftir verðini.

So hendi tað gleðiliga undrið, at Bjarti fekk nýtt lunga. Alt gekk væl. Hann og Sonny komu heim til jóla og øll gleddust um hetta. Men aftur rakti lagnan Bjarta. Og bert tríggjar mánaðir seinni andaðist Bjarti bert 40 ára gamal.

Góða Sonny, túsund takk fyri tað tú hevur verið fyri Bjarta. Tín vilji og styrki og ikki minst lætta lyndi hevur hjálpt okkum øllum. Harrin styrki teg í sorgini og vælsigni teg í framtíðini.

Góðu mamma og pabba. Takk fyri alt tit hava verið fyri Bjarta og meg. Og Harrin styrki tykkum.

»Bert er bróðurleyst bak« verður sagt. Og tað má ein sanna, tá ein hevur mist sín einasta bróður.

Við hesum lýsi eg frið yvir kæra bróður mín Bjarta Mortensen.

**Bogi**

## Brúdleyp

Í dag, 10. mai, giftast í prestagarðinum í Fuglafirði Marjun Dahl, Oyri, og Jan Erik Jacobsen, Fuglafirði. Opið hús verður í heiminum frá kl. 10.00 til kl. 16.00.

Í dag, 10. mai, giftast Heidi Sørensen, Hvannasund, og Bogi Olsen, Klaksvík.
Brúdleypsadr.: Helnabrekka 21, Klaksvík.